# Vit reistu okkum



*- Vit báðir tosaðu nógv um, at hatta ikki var nóg gott, sum vit sýndu í Litava, sigur Fróði Benjaminsen um samspælið millum seg og Julian Johnsson*

**Fróði Benjaminsen var fegin um, at miðvøllurin fekst at rigga móti Týsklandi, og at tað ikki gekk sum móti Litava**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**Hannover:** Tað er einki at dylja, at ein av orsøkunum til laka úrslitið í Kaunas var, at føroyski miðvøllurin ikki riggaði nóg væl. Fróði Benjaminsen og Julian Johnsson hava verið fastir fúsir her seinastu dystirnar, og í mikudagsblaðnum ásannaði Julian, at hesin parutrin í øllum førum skuldi betrast.

Eftir dystin móti Týsklandi hittu vit Fróða Benjaminsen, og sum vera man, so var hann hampuliga væl nøgdur, og ikki minst um avrikini hjá sær og Julian.

- Vit báðir tosaðu nógv um, at hatta ikki var nóg gott, sum vit sýndu í Litava, og vit vóru uppsettir upp á at vísa, at har var talan um ein off-day.

- Tíbetur gav venjarin okkum langt tjóður hesaferð, og eg haldi eisini sjálvur, at vit løntu honum hetta álitið aftur í dystinum.

# Ófatulig ávirkan

**Stjórin hjá Atlantic Airways er ikki í iva um, at úrslitið í dystinum mikudagin kann hava ófatuligan týdning fyri føroyska ferðavinnu**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**Hannover:** Í hósdagsblað okkara høvdu vit prát við stjóran í Atlantsflog, har tosað varð um týdningin, sum fótbóltslandsliðið hevur fyri ferðavinnuna.

Tá segði hann, at hetta partvíst varð treytað av, hvørjum londum vit møttu og partvíst, hvussu úrslitini vóru.

Mikukvøldið hittu vit aftur Magna Arge á flogvøllinum í Hannover, og tá var spurningurin sjálvsagt, hvussu nógv málið hjá Føroyum ella úrslitið sum heild, var vert fyri ferðavinnuna.



*Áhugin fyri Føroyum undan dystinum hevur verið stórur, og tað sum hetta fer at føra við sær, verður so nógvar ferðir størri, sigur Magni Arge*

- Tað ber slettis ikki til at gera hetta upp í pengum. Áhugin fyri Føroyum undan dystinum hevur verið stórur, og tað sum hetta fer at føra við sær, verður so nógvar ferðir størri.

- Eg kann til dømis nevna, at stjórin í Ice-landair segði mær, hvussu øvundsjúkur hann var, tí Føroyar fingu seks síður í flogmagasininum, sum eitur Focus. Hetta svarar til eitt lýsingarvirði upp á einar 200.000 evrir, og tað er bert í einum blað.

- Vit hava fingið síðu oman á síðu í hópin av bløðum. Sjónvarpslið hava verið í Føroyum og gjørt sendingar, og yvirhøvur hevur talan verið um serstakliga positiva umrøðu. Tað er lýsingarvirði, sum als ikki kann gerast upp í pengum, og eftir dagin í dag er áhugin bara øktur.

- Eg skal ikki standa og siga, at hetta verður gjøgnumbrotið hjá Føroyum á týska ferðavinnumarknaðinum, men kemur tað ikki nú, so kemur tað ongantíð. Og óansæð um tað kemur ella ikki, so er reklaman, sum vit nú hava fingið, somikið stór, at hon als ikki kann gerast upp í pengum.

# Mundi kollgitt



*Tá áskoðarar okkara sungu tjóðsangin letur í ítróttarministarunum, at hatta máttu teir í øllum førum klappa fyri, og so gjørdu teir tað*

**Nógv yptu øksl, tá FSF formaðurin undan dystinum gitti 3-2 til Týskland, men tað var tó um reppið, at hann fekk rætt**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**Hannover:** - Munurin var so hin sami, so heilt skeivt var tað ikki, segði formaðurin flennandi, tá vit fingu orðið á hann, beint sum hann kom inn um trygdardurðin í flogvøllinum í Hannover.

Dánjal sipaði við hesum til gitingina, sum hann kom við í mikudagsblaðnum, har hann segði, at hann roknaði við, at dysturin fór at enda 3-2 til týsku vertirnar.

Og tað var ikki sørt, at formaðurin var errin, tá tosið fall inn á dystin.

- Hetta úrslitið er eitt ótrúligt aktiv hjá øllum føroyingum. Ikki minst fyri ferðavinnuna. Tað kann væl vera, at vit taptu dystin, men vit fóru av vøllinum sum vinnarar, meðan týskararnir vórðu bu'aðir út av sínum egnu, og tað er í øllum førum ikki ofta, at tað er hent.

- Sjálvur sat eg við síðuna av formanninum í týska fótbóltssambandinum og ítróttarministaranum. Tá áskoðarar okkara sungu tjóðsangin letur í ítróttarministarunum, at hatta máttu teir í øllum førum klappa fyri, og so gjørdu teir tað.

### VIP'arnir heiðraðu spælarunum

Tað stuttligasta var kanska, tá leikararnir eftir dystin skuldu út í eitt telt, har FSF høvdu fyrireikað ein nátturabita til teir.

- Tað var eitt telt fyri sonevndu VIP'ararnar, og so vit so fingið loyvi at hava eitt borð við endan. Tá leikararnir komu inn reistust øll hesi 300-400 fólkini, sum vóru í teltinum, og góvu leikarunum eitt klapp, og støðan var hin sama, tá døgurðin var liguður. Tað var ein heilt fantastisk uppliving, segði Dánjal Andreasen at enda.

# Einki at iðra seg um

**Hóast hann hevði ein stóran møguleika at skaka Týskland av álvara, so tóktist Hjalgrím Elttør rímiliga avkláraður um støðuna mikukvøldið**

TÝSKLAND-FØROYAR
*Jákup Mørk*
*Álvur Haraldsen*

**Hannover:** Stóra løtan í Hannover kundi verið enn størri, um Hjalgrím Elttør hevði skorað upp á møguleikan, sum hann fekk stutt fyri leiklok.

Onkur vildi kanska vera við, at tað mundi vera sjónin av framstormandi Oliver Kahn, sum kløkkaði Hjalgrím somikið nógv, men hesum var ungi klaksvíkingurin tó ikki samdur í.

- Tað haldi eg ikki. Hatta eru støður, sum koma fyri av og á, so eg hugsaði ikki stórvegis um tað, men kanska hevur tað sitið onku staðni í bakhøvdinum, at hetta var heimsins besti málverji, sum kom ímóti mær.

- Eg haldi annars, at eg gjørdi alt rætt, tá eg skeyt bóltin fram við honum. Eg kundi kanska tikið eitt trekk afturat ella roynt at lobba, men sjálvur sá eg bóltin í málinum, men tað skuldi bara ikki vera so.

Og hóast misnýtta møguleikan, so var Hjalgrím sum heild nøgdur um føroyska avrikið.

- Eg haldi so ikki, at vit skulu iðra okkum um at tapa 2-1 fyri Týsklandi á útivølli. Tað varð jú tosað um bæði seks og átta mál, so vit eiga heldur at fegnast um, at vit soleiðis vóru við til at skapa ein góðan dyst, men sjálvandi. Tað kundi jú verið javnleikur...



*- Eg haldi so ikki, at vit skulu iðra okkum um at tapa 2-1 fyri Týsklandi á útivølli, helt Hjalgrím Elttør eftir dystin*



# Norra fingið vind í seglini

**Eftir eina serstakliga veika HM-undankapping hevur Norra nú lagt seg á odda í sínum bólki, har Danmark hevði frí mikukvøldið. Finland tapti sín heimadyst móti Jugoslavia, og í venjingardysti misti Svøríki 2-0 leiðslu og tapti móti Portugal**

FÓTBÓLTSGRANNAR
*Hilmar Jan Hansen*

Misjavnt var, hvat grannar okkara fingu burtur úr fótbóltinum mikukvøldið. Meðan Føroyar stríddu seg til eitt serstakliga heiðurligt úrslit móti varaheimsmeistarunum úr Týsklandi, vóru eisini Norra, Finland og Svøríki í dysti.

Serliga norðmenn eru í góðum hýri, tí teir á Ullevål í Oslo vunnu ein fult uppibornan 2-0 sigur á Bosnia/-Herzegovina, ið ikki hevið tað stóra at borðreiða við, tí Norra sat á dystinum frá byrjan til enda.

Longu í sætta minutti kundi Claus Lundekvam leggja Norra á odda. Liverpool-spælarin John Arne Riise sendi hornaspark innfyri, og har var Henning Berg hæsti maður og skallaði móti málinum. Har var Lundekvam á blettinum og mest við búkinum fekk hann koyrt bóltin í málið til 1-0.

Hetta var fyrsta landsliðsmálið hjá Claus Lundekvam nakrantíð, og samstundis mál nummar túsund hjá norska landsliðnum gjøgnum allar tíðir. Nú er tað so bara í Southampton, har Lundekvam vinnur til dagligt breyð, at hann eigur á at skjóta mál.

### Norra stýrdi

Ikki gingu meira enn tjúgu minuttir, so stóð John Arne Riise fyri tørni at økja til 2-0 eftir óbeinleiðis fríspark. Ole Gunnar Solskjær nart við bóltin, og so dundraði Riise til úr 20 metrum, uttan at bosniski málverjin Almir Tolja kundi gera nakað sum helst við bóltin.

Annars var tað ikki minst málverjanum fyri at takka, at Bosnia/Herzegovina ikki fekk eitt stórtap á Ullevål, tí fleiri ferðir hevði Tolja góðar og avgerandi bjargingar.

Norra stýrdi dystinum trygt frá byrjan til enda, og bara ta einu ferðina var vandi á ferð í hinum endanum, men Frode Olsen í norska málinum fekk við einari fótparadu steðgað royndini frá Elvir Baljic trettan minuttir fyri tíð.

Við sigrinum kunnu norðmenn staðfesta, at tað gongur sum eftir ánni hjá teimum, tí eftir tríggjar dystir eru teir við sjey stigum á odda í bólki 2 — eitt stig framman fyri Rumenia og trý stig framman fyri Danmark, sum hevði frí mikukvøldið.

Í hinum dystinum í hesum bólkinum máttu Allan Simonsen og hansara menn á heimavølli í Luksemburg leggja rygg til stórtap móti Rumenia, sum vann 7-0 í einum dysti, sum fyri tað mesta var spæl upp á eitt mál.

### Fáligir finnar

Ein góð byrjan gjørdist ikki nóg mikið hjá Finlandi, sum á útivølli í Beograd skuldi royna seg móti Jugoslavia. Tá avtornaði, vunnu jugoslavar 2-0, og finnar kunnu við trimum stigum í trimum dystum neyvan vænta sær nakað EM-endaspæl hesa ferð heldur.

Finnarnir kom annars betur frá byrjan enn vertirnir, og tað eydnaðist í løtum at trýsta Jugoslavia langt aftur á vøllin. Fyrsta hálva tíman átti Finland málkjansirnar, og hornasparkshagtølini søgdu 8-1.

Men í seinna hálvleiki kom vend í, og tá ellivu minuttir vóru farnir, fekk Jugoslavia fyrra málið. Sinisa Mihajlovic royndi seg við frísparki, sum endaði í finska verjumúrinum, men so var Darko Kovacevic á blettinum og setti bóltin í málið.

Og tá so Jugoslavia fekk brotsspark seks minuttir fyri tíð, var liðugt. Juha Reini rakti Mladen Krstajic við alboganum í brotsteignum og fekk reyða kortið, og í næstu løtuni kundi Sinisa Mihajlovic trygt senda brotssparkið fram við finska málverjanum Antti Niemi.

### Svøríki misti alt

Svøríki, sum er í bólki saman við Lettlandi, Polandi, Ungarn og San Marino, hevði frí mikukvøldið, men spældi kortini ein venjingardyst móti Portugal á Nya Ullevi í Göteborg.

Ikki kann sigast annað, enn at Svøríki legði bragdliga fyri, tí eftir bara 25 minuttir var støðan longu 2-0 móti komandi EM-vertunum. Longu í sjeynda minutti legði liðfelagin hjá Toda Jónsson í FCK, Jörgen Pettersson, svenska landsliðið á odda, og í 25. minutti økti Marcus Allbäck.

Svøríki royndi seg við einari 3-5-2 uppstilling, fyri at fáa meira álopsspæl, men tað riggaði altso ikki meira enn fyrsta hálva tíman, tí so vendi dysturin. Tíggju minuttir fyri hálvleik syrgdi Sergio Conceição fyri at minka um munin, og bara átta minuttir inni í seinna hálvleiki javnaði Romeu Almeida til 2-2.

Nú var tað Portugal, sum stóð fyri undirhaldinum, og svenska verjan varð trýst í botn. Sum fráleið kom Svøríki betur við, men megnaði kortini ikki at forða fyri, at gestirnir vunnu dystin 3-2. Síðsta málið skoraði Rui Costa átta minuttir fyri tíð við einum langskoti.

# So fekk Ísland fyrstu stigini

**Á heimavølli móti Litava vísti Ísland heilt annan hugburð og heilt annað spæl, enn tá liðið leygardagin tapti á sama stað móti Skotlandi**

Ísland-Litava
*Hilmar Jan Hansen*

Hóast teir máttu bíða til seinna hálvleik, fingu íslendsku heimaáskoðararnir tað, teir vóru komnir at hyggja at á Laugardalsvölli í Reykjavík mikukvøldið: Ein íslendskan sigur, trý stig og eitt farvæl til aftasta bólkinum, sum Føroyar nú hava arvað.

Tað vóru annars litavar, ið høvdu fyrsta málmøguleikan, tá Dainius Gleveckas kom at standa væl fyri eftir eitt hornaspark í trettanda minutti, men sendi bóltin uppum.

So kom Ísland meira fyri seg, og longu í fyrra hálvleiki gav Chelsea-maðurin Eiður Smári Guðjohnsen ábendingar um, hvat kundi vera á veg. Bæði eina og tvær ferðir noyddi hann litaviska málverjan Gintaras Stauce at vísa somu kynstrini, hann leygardagin vísti í endanum á dystinum móti Føroyum.

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki var tað so, at vend av álvara kom í dystin, tá Litava fekk ein mann útvístan. Bara 21 minuttir vóru farnir, tá Deividas Cesnaukskis fekk reyða kortið frá dómaranum fyri hevnisøku móti Arnari Viðarsson, og so byrjaði íslendska yvirvágin at mynda seg.

### Eiður átti alt

Tað var tó ikki fyrr enn í seinna hálvleiki, at íslendingar fingu hol á og kundu byrja sína málveitslu, ið endaði við tryggja 3-0 sigrinum. Og umframt at skjóta tvey tey seinnu málini, átti Eiður Guðjohnsen eisini uppleggið til tað fyrsta. Í 49. minutti sendi hann bóltin innfyri úr høgru, og fyri málinum var Heiður Helgason hægstur og skallaði bóltin inn til 1-0.

Á tímanum bleiv Eiður spældur í dýpdina og kundi renna seg leysan, fyri síðani at skora trygt til 2-0. Seinna málið hjá honum, sum hann skoraði eitt gott korter fyri tíð, var sera væl úr hondum greitt.

Ein langur og kanska tilvildarligur bóltur endaði frammi í høgru síðu, og við fleiri litavum rennandi rundan um seg dróg Eiður Guðjohnsen inn móti miðjuni, fyri síðani at smekka til ein metur uttan fyri litaviska brotsteiginum — og so var 3-0.

### Brendi brotsspark

Sum um Chelsea-spælarin ikki hevði gjørt nóg mikið, fekk hann enntá í síðsta minutti gyltasta møguleikan at skora hat-trick, tá Ísland fekk brotsspark. Men hesa ferð var Eiður Guðjohnsen ikki nóg kaldur, og brotssparkið fór upp um málið.

Kortini man eingin ivi vera um, at íslendingar eru sera fegnir um avrikið hjá honum og hinum í dystinum mikukvøldið, og mest av øllum munnu teir fegnast um, at aftasta plássið ikki longur er teirra.

Við sigrinum fór Ísland upp um bæði Litava og Føroyar, og er nú á triðja plássi – aftan fyri Týskland og Skotland.

# Týska pressan hugtikin

**Hóast teir ikki eru nøgdir við avrikið hjá sínum egnu, so er úrlatingin ikki so ógvuslig, sum tað kundi roknast við**

TÝSKLAND–FØROYAR
*Jóannes Hansen*

Føroyar og føroyingar áttu eisini í gjár stóra rúmd í týsku fjølmiðlunum, sum í umrøðunum av Føroyum og føroyska landsliðnum alla tíðina hava verið sera saklig og fólkalig. Føroyska landsliðið verður mest sum hvørja ferð nevnt europeisku fótbóltsdvørgurin, og tað verður tikið til, hvussu væl føroyingar megnaðu at bjóða av við einføldum manngarði á egnari hálvu og kontraspæli.

– Føroysku spælararnir høvdu ikki hægri støði enn teir hava, sum eru í regionalliguni (næstbesta týska deildin), helt venjarin hjá Bochum, Peter Neururer, sum fíltist á, at týska liðið ikki megnaði at gera fleiri enn tvey mál.

– Hóast okkara lið er á fjórða plássi á FIFA styrkislistanum, og Føroyar eru á 119. plássinum, so vóru tað okkara spælarar, ið spældu sum amatørar og ikki føroysku lærararnir, elektrikarararnir og húsasmiðirnir, varð tikið til í Bild, sum spyr, hvussu tað hevði verið vorðið í Týsklandi, um innskifti Hjalgrím Elttør sjey minuttir undan dystarenda hevði megnað at skorað, tá hann var púra leysur við Oliver Kahn, og bólturin fór í stólpan og út og ikki í stólpan og inn.

– Royndin ímóti Bosnia Hersegovina var ikki góð, og hetta var uppaftur verri. Rudi Völler slapp akkurát undan totalu eyðmýkingini. Landsliðið fer nú í vetrarfrí, og tað kemur sera væl við, at næsti EM undankappingardysturin ikki er á skránni fyrrenn 29. mars, tá Litava verður gestur í Nürnberg. Vit eru heppin at vera á odda í bólkinm, nú tað verður farið í vetrarfrí, segði Bild.

Umframt at rósa Jákupi Mikkelsen og at siga, at teir hildu Jákup á Borg og Andrew av Fløtum spæla væl, so geva teir onkrum av týsku spælarunum gott skoðsmál:

– Ballack var okkara besti maður. Hann hevur megnað at skora í hvussu so er eitt mál í fimm dystum upp í slag, og tað er gott. At Morislav Klose var ovurfegin, tá hann hevði stútað sigursmálið var ikki at undrast á. Hetta var fyrsta málið hjá honum á landsliðnum í 629 minuttir, visti Bild at siga.

Og so undraðust teir yvir føroyska áhugan og solidaritetin.

– 550 føroyingar vóru í Hannover. Tað er meiri enn eitt prosent av samlaða fólkatalinum í Føroyum. Sammeta vit við týsk viðurskifti, so vil tað siga, at átta hundrað túsund týskarar fara út at ferðast saman við fótbóltslandsliðnum. Áhugin í Føroyum er undrunarsama stórur fyri landsliðnum, og Føroyar eiga eitt gott landslið, tá hugsað verður um grundarlagið og umstøðurnar, staðfestir Bild.